# Sethúsasølan

# Móttøka

Í samband við eigaraskifti
verður móttøka fríggjadagin 4. juni
frá kl. 15.00-17.00.

**SHS Sethúsasølan, Tórsgøta 16**



## Marknaðarfólk

STARV sosialurin

Ert tú fyrikomandi, dugir tú væl at selja, ert tú álítandi, røkin og dugur at arbeiða sjálvstøðugt, so ert tú júst tann persónurin, sum vit leita eftir.

Til marknaðardeild okkara søkja vit eftir starvsfólki, sum kann vera viðvirkandi til framhaldandi at menna inntøkugrundarlag okkara, og sum í ávísan mun eisini kann átaka sær leiðsluupp-gávur.

Lýsingarinntøkur eru ein týðandi partur av tilverugrundarlagnum hjá føroysku bløðunum, og tí leita vit støðugt eftir nýggjum hættum at menna hendan partin av fyritøkuni. Tí er tørvur á fólkum, sum duga at fáa og ikki minst arbeiða víðari við góðum hugskotum. Kundarøkt, account-management og telemarketing eru eisini arbeiðsuppgávur, sum vit framyvir koma at leggja enn størri dent á, og kemur starvið eisini partvíst at fevna um hesi øki.

Í samstarvi við starvsfelagarnar á marknaðardeildini verður tú eisini við í dagligu framleiðsluni av blaðnum. Herundir tilrættislegging av lýsingarátøkum, temabløðum og lýsingartilboðum.

Løn verður ásett sambært avtalu.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so er bert at senda eina umsókn við frágreiðing um útbúgving og royndir til okkum. Ynskir tú at fáa meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Jonhard Hammer, marknaðarleiðara, á tlf. 341800. Tað ber sjálvandi eisini til at senda teldupost á jonhard@sosialurin.fo

Umsóknarfreistin er 11. juni, og skal umsóknin saman við viðkomandi skjølum sendast til:

**Sosialurin**
**Marknaðardeildin**
**Postsmoga 76**
**110 Tórshavn**

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin

Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blað. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.



Sosialurin
Sosialurin
i


## HEILSANIR



**Góði Alex**
Hjartaliga tillukku við 15 ára føðingardegnum í dag 4. juni. Jesus veri hjá tær. Vónandi hevði tú ein góðan túr við Gjógv við 8. flokkunum.
**Ynskja mamma, babba og beiggjarnir**
**PS:** Omma og abbi lata eisini heilsa



**Góða Ása**
Hjartaliga tillukku við 7 ára degnum 4. juni 2004. Jesus signi framtíð tína.
**Heilsan mamma, babba, Súni, Sonny og Mary**



**Góða elskaði Fríði**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum. Alt að besta í framtíðini. Vit elska teg.
**Ynskja mamma og babba**



**Góða Katrin**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum 27. mai. Her var tú fitt og rund.
**Heilsan frá okkum øllum**



**Góða Hildubjørg**
Hjartaliga tillukku við 10 ára føðingardegnum, ið var tann 19. mars.
**ynskja omma og abbi á Toftum**



**Góða elskaði Fríði**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum. Gott at hava teg her heima aftur. Alt tað besta í framtíðini.
**Ynskja omma, abbi og mostir**


## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:........................................................................
........................................................................
........................................................................
........................................................................
........................................................................
........................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn: ........................................................................
Bústaður: ........................................................................
Bygd/býur: .................................. Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:

Sosialurin

Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«




## TILTØK

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis verður barnaansing. Kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 12 eisini Møti, har Óli Steinberg úr Klaksvík talar.
www.hebron.fo

**Frelsunarherurin, Tórsgøta 19**
Um viðrar, verður útifundur leygardagin kl. 11.
Sunnudagin kl. 11 fer sunnudagsskúlin útferð. Tá verður bert møti kl. 18 við »ekko« frá Íslandstúrinum, drekkamunnur. Viðrar ikki, verður eisini møti kl. 11. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 19 Møtirøðin »Rørir tað teg?« v/ Robert Bwalya..
Í morgin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, ABC v/ Frank Jacobsen, evnið er: Fyrigeving við blóði Jesusar, 1. partur, kl. 18 Møti.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin saman við Rhema, Evangeliihúsinum og Meinigheitini í Hoyvík. www.filadelfia.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
**Sunnudagin 6. juni:**
Eldrasamkoman og varðmenn fara útferð vestur íVágar. Vit møtast í KFUK kl. 9 sunnumorgunin til kaffi og rundstykkir. Tað er neyðugt at tekna seg til útferðina á tlf. 311824 ella 311928 og á fartlf. 211824 í seinasta lagi fríggjadagin 4. juni kl. 14.00.

**Lívdin í Hoyvíkar skúla**
(inngongdin er flutt til nýggjaskúla)
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 verður evnið: Truplir spurningar úr Bíbliuni »Hvat við teimum, sum ongantíð hava hoyrt?«. Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 er evnið: »Halgan«. Á báðum møtunum talar Zacharias Zachariasen. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum.
Sunnudagsskúli er kl. 12.
Drekkamunnur millum møtini.
Týskvøldið kl. 20 Bøn- og bíbiltími, samandráttur av Opinberingini. www.livdin.fo

**Meinigheitin í Hoyvík uppi á Brekku 3**
Í kvøld kl. 20 After Eight.
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta kl. 11 v/ Paula Høj. Evnið: Trúfesti, sunnudagsskúli kl. 12. Útimøti á Vaglinum kl. 22.
Mánakvøldið kl. 20 Felags Bønarmøti í Filadelfia.
Mikumorgun kl. 7 Bønarmøti.

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Minnismáltíð Harrans. kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 Mánaðarmøti: Trivnaður í samkomuni, Poul Færø talar.

**Samkoman Rhema**
Einki møti sunnudagin vegna legu. www.rhema.fo

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á vanligu støðunum, kl. 18 Møti.

**Meinigheitshúsið**
Fríggjakvøldið kl. 19.30-21 Juniorhugni.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Bergur D. Joensen, Meinigheitskórið syngur.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Hósdagin kl. 20 verður Taizékvøld (bønarstund hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16). Øll eru vælkomin.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Wladyslw Zdunek, presti í Mariukirkjuni, kl. 14 sunnudagsskúli.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Kaldbak**
Heimamissiónin hevur útimøti leygarkvøldið kl. 20 við skúlan.

**Vestmanna missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti við Gunnar Reynslág av Argjum.

**Saron, Vestmanna**
Evangel. møti verður sunnudagin kl. 18, Svein Askildsen talar. Nátturði verður aftan á møti. Verið hjartaliga vælkomin í Saron.

**Hvalvíkar Missiónshús**
Í sambandi við 100 ára haldið hjá Heimamissiónini verða vikuskiftismøtir í missiónshúsinum.
Leygarkvøldið kl. 20 við luttøku úr Porkeri har Hilmar Bech og Magnus Hansen tala og Streingjakórið syngur.
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli kl. 18 Møti við Niels Jacob Nielsen, trúboðara, Johanna, Halgerð og Marita syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Jan Jacobsen, Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Berøa, Saltangará**
Sunnudagsskúli og breyðbróting kl. 11.30, síðani familjumøti kl. 12.45 og máltíð aftaná. Við vera fólk frá OM, ið fyrireika Doulos vitjanina. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Johild Finsson talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.
www.jesus.fo

**Lívsins Orð, Saltangará**
Møti verður sunnudagin kl. 10.30.
Mánakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti. Øll eru vælkomin.

**Getsemane, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 11 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

KFUM & K, Klaksvík
Fríggjakvøldið kl. 22 Café.
Leygardagin kl. 21 Ungdómsmøti við Øssur Kjølbro, Gospelkórið Gleði syngur. Aftaná midnáttarsamkomu opið hús, tónleikakafé við livandi tónleiki frá Credo.
Sunnudagin kl. 15 Barnacafé, kl. 18 Møti við Jóannes Jóhannessen, Streingjakórið syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin til øll tiltøkini á norðoyastevnu.

**Betania, Skopun**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 16 Felags barnamøti verður fyri smáir einglar, sólstrálan og stríðsmenn. Sonni kemur og greiður frá arbeiðinum í Papa New Guinea, gáva kann latast til arbeiði. Vælkomin í Betania.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsangsløta, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sandur**
Sangløta verður í ungmannafelagshúsinum á Sandi leygarkvøldið 5. juni kl. 20 við luttøku av Streingjakórinum á Glyvrum og lokalum kreftum. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið á Sandi**
Sunnudagin kl. 17 Møti við luttøku av Streingjakórinum á Glyvrum og Bláa Krossi. Øll eru vælkomin.

**Skálavík**
Leygardagin kl. 13-18 verður Bíbliuskeið í bygdarhúsinum í Skálavík. Evnið: Nýggja lívið í Kristusi. Svenning av Lofti og Poul Johan Djurhuus undirvísa. Øll eru vælkomin. Tekning á 312045 og 212045.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur.
Ónsdagin kl. 20 Bønar- og uppbyggingarfundur.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti. Eyðun Christiansen talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sion, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánakvøld Bønarmøti kl. 21 og bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Mánadagur 31. mai.***
kl. 10-10.30 **2. hvítusunnudagur – stongt.**
***Týsdagur 1. juni***
kl. 10-11.30 Sangur, Óli Vang. Vit fáa vitjan úr Íslandi. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15-17 Opið hús
***Mikudagur 2. juni***
kl. 10-15 Opið hús
kl. 15 **Vit vitja framsýningina: »Lær um upphav Føroya« á Føroya Náttúrugripasavn og Jarðfrøðissavnið. Kostnaður 20,-**
***Hósdagur 3. juni***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-16 Boccia í kjallaranum
***Fríggjadagur 4. juni***
kl. 12-20 **Tiltak í Grasagarði frá kl. 15-20 »Litir og lutir renna millum runnar«. Drekka og rabarbukøka verður at fáa**

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Eysturoyar Gongufelag**
Gongutúrur verður í Skúvoynni sunnudagin 6. juni. Gingið verður í Fagradal við meira. Vit møtast á Gomlu Rætt kl. 9.30. Túrurin er miðal. Havi matpakka við. Ferðaleiðari er Óla Jákup Hentze úr Skúvoy. Tilmelding á Kunningarstovunum í Eysturoynni innan fríggjadagin 4. juni kl. 15.
Fuglafjørður tlf. 444860
infoey-f@post.olivant.fo
ella Runavík tlf. 449449
infoey-r@post.olivant.fo
**Farið verður til Hetlands mánadagin 21. juni og komið verður aftur mikudagin 23. juni.**
Kostnaður íroknað ferðing og gisting: Í 4-koyggju kamar umborð á Norrønu + 1 nátt á hotel í Lervick í dupultkamar kr. 1825 (einkult kamar á hotellinum 300 kr. eyka).
Tilmelding á Kunningarstovunum í Eysturoynni innan hósdagin 10. juni,
Runavík tlf. 449449
infoey-r@post.olivant.fo
og Fuglafjørður tlf. 444860
infoey-r@post.olivant.fo

**Tilhaldið Hugnin í Sandoynni**
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar**
*í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum – allir pensionistar hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag-fríggjadag kl. 1*5-18.
***Týsdagin 1. juni***
Ítriv fyri áhugað
***Mikudagin 2. juni***
Helen og Eyðun Joensen greiða frá ferð teirra í Kina
***Hósdagin 3. juni***
Fimleikur v/ Jóhannu Troest
***Fríggjadagin 4. juni***
Opið hús

*Tú fært altíð ein góðan drekkamunn, somuleiðis eitt gott Guðs orð. Bløðini eru altíð til taks.*

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag.
Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin.
Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**ACA**
(Adult children anonymous).
Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.acadanmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Fyribyrgingarráðið**
*Argjaboðagøta 7 · 160 Argir*
*postrúm 135 · 110 Tórshavn*
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostadr.:
fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

**Lymfødemfelagið**
*Box 2113, FO 165 Argir*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Heilafelagið**
*felagið fyri apopleksi- og afasirakt*
Íslandsvegur 10 · tlf. 321520
T-post: heila@post.olivant.fo

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894.
Fø. Sparikassi 442027-8.

**Javni**
*Hoydalsvegur 40 · 3 hædd*
Skrivstovan hjá Javna er opin týsdag til fríggjadag frá kl. 10-14.
Tlf. nr. 314827 · faks 310557.
Vit hava eisini eina heimasíðu: www.javni.fo
og t-post adressu:
javni@post.olivant.fo har tit altíð eru vælkomin at senda spurningar ella viðmerkingar.

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.